# Rimmar róðrargalla við Steffen Brandt í Føroyahúsinum

**Rógvarir í Danmark vóru til rimmargallaveitslu í Føroyahúsinum leygardagin, har millum annað sangarin í TV2 Steffen Brandt, og Jensina Olsen frá E elski Førjar undirhildu**

RÓÐRARGALLA
*Marjun Dalsgaard*
*marjund@hotmail.com*

Takið mundi fari uppfrá í Føroyahúsinum í Keypmannahavn leygarkvøldið, tá sangarin í TV2, Steffen Brandt steig á pallin.

Kappingarárið er júst liðugt í Danmark, og leygarkvøldi settu róðrarfeløgini pynktum fyri árið við eini rimmar gallaveitslu í Føroyahúsinum.

Á skránni var millum annad undirhald við kenda sangaranum í TV2, Steffen Brandt, Jensinu Olsen og dansur við Revival.

At fáa Steffen Brandt at luttaka hevur kravt eitt sindur eyka, og tí hevur eisini veri neyðugt við stuðuli aðrastaðni frá.

- Vit hava fingið stuðul til tiltakið frá Miðlahúsinum, Atlantic Airways og Føroyahúsinum, og tað eru vit sera fegin um – tað hevði nokk ikki kunna lati seg gjørt uttan. Hetta skal síggjast sum stuðul av tí føroyska kapproðrinum í Danmark, sigur Hjalmar Joensen, sum eru í veitslunevndini.









*Aftur í ár var rimmar róðrargalla í Føroyahúsinum. Á skránni var vóru millum annað Steffen Brandt, sangari í TV2, Jensina Olsen frá E elski Førjar og Revival, sum spældu til dans aftaná. Miðlahúsið, Føroyahúsið og Atlantic Airways hava stuðlað tiltakinum*



